# DÓLGARNIR SAMAN AFTUR

21 ÁR ERU LIÐIN SÍÐANI **DÓLGARNIR** SEINAST VÓRU AT SÍGGJA Í KRINGVARPINUM. NÚ ERU TEIR AFTUR Á SKÍGGJANUM, OG **BØRNINI** HJÁ TEIMUM, SUM ELSKAÐU DÓLGARNAR Í 1980-UNUM, LÆRA TEIR NÚ AT KENNA. VIT SAVNAÐU TEIR TRÍGGJAR TIL EITT PRÁT UM GAMLAR DAGAR OG **DÓLGALÍV**.



**DÓLGARNIR**
**Inna Törnroos**
inna@sosialurin.fo

Erling er fyrstur, síðani dettur Hans Jacob inn, og seinastur er Egi.

Tað kennist søguligt at savna hesar tríggjar menn saman, sum merktu so nógv fyri okkum, sum vuksu upp í 1980-unum. Teir líkjast sær sjálvum, hárið er eitt sindur gránað, og rukkurnar nakrar fleiri. Men skálkabrosið er tað sama, og tað tekur ikki langa løtu frá tí, teir tríggir eru í sama rúmi, til vit øll hava láturkrampa.

Dólgarnir hava ikki samstarvað, síðani Dólgarnir vóru niðurlagdir 1988, men teir kennast væl. Bæði sum vinmenn – Egi og Erling, svágrar – Egi og Hans Jacob, og so hevur Erling faktiskt veri næmingur hjá Hans Jacob eina ferð í tíðini.

Maðurin handan Dólgarnar Zacharias Hammer er ikki við. Hann var tann, ið savnaði teir tríggjar og koyrdi bilin til Leynar á fyrstani tíði 1985, tá fyrstu upptøkurnar vóru gjørdar.

**Egi**: Eg minnist, at eg spurdi Zacharias, hvat tað var, vit skuldu gera. Hann svaraði, at tað skuldi handla um nakrar dólgar, sum búðu í fjøllunum. Og so



*Dólgarnir Bjørn, Berint og Bjarti sum teir sóðu út 1988, og sum nú verður endursent í Kringvarpinum.*

helt hann, at teir skuldu koma oman úr fjøllunum. Men nógv meir visti hann ikki. At vit skuldu eita B-B-B – Bjørn, Berint og Bjarti – avgjørdu vit eisini á vegnum til Leynar hendan dagin.

**Hans Jacob**: Einki var ógjørligt hjá Zacharias. Skuldi tað vera ein slupp, so skaffaði hann okkum eina slupp, skuldu vit koyra buss, so steðgaði hann einum bussi. »So gera vit bara tað« var hansara slagorð.

## Tann bangni

Dólgarnir fingu saman við nøvnunum eisini ymisk eyðkenni. Bjørn var tann klóki, Berint tann bangni, og Bjarti tann djarvi.

**Egi**: Eg sá fyri mær, at Zacharias fór at finna upp á ymiskt, sum eg ikki hevði so góðan hug til, so eg avgjørdi beinavegin, at eg skuldi verða tann bangni Berint. So kundi eg sleppa frá at spæla »stuntmaður«.

**Erling**: Eg var rættuliga villur hasa tíðina, so hjá mær passaði tað væl at vera djarvur.

**Hans Jacob**: Eg skuldi so eitast at vera tann klóki, men eg fekk ikki sagt tað stóra, eftirsum Egi og Erling avbrutu meg alla tíðina.

Tá spælt var inn, var lítið avgjørt áðrenn, hvat skuldi gerast. Rammurnar – hvar teir skuldu vera – vóru fastar, men dialogurin var fyri tað mest improviseraður.

Summar dagar var spælt inn sama dag, ið sendingin skuldi í sjónvarpið.

**Egi**: Eg minnist, hvussu eg og myndamaðurin Per Zakariassen koyrdu við fullari ferð úr Leynum til Havnar at klippa sendingina saman. Eina ferð kliptu vit, meðan sendingin koyrdi í sjónvarpinum.

**Hans Jacob**: Hetta var fyrstu tíðina við føroyskum sjónvarpi, og tá var alt stuttligt. Ongin hugsaði um tímaløn og yvirtíð, vit spældu og hugnaðu okkum.

## Facebook-bólkur

Allir tríggir eru á einum máli um, at tað er yvirraskandi, at Dólgarnir

▶